# Avloysarar søkjast til dagrøktina í Nes kommunu

Dagrøktin í Nes kommunu søkir eftir avloysarum at byrja 1. mars 2006 ella eftir avtalu og fram til hálvan juli 2006 fyribils.

**Vit krevja:**

- At tú hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri.
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- At tú hevur hug at ansa børnum í heimi tínum.

Arbeiðstíðin er millum kl. 7.30-17.15.
Lønin er millum FA og FKA.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 448462 ella 218462 og tosa við Katrin Poulsen dagrøktarleiðara.

Umsóknir skulu vera dagrøktini í Nes kommunu í hendi í seinsta lagi 20. februar 2006 kl. 12.00.

**Nes kommuna**

## LÆRLING TIL RADIOVERKSTAÐ

Hevur tú hug at útbúgva teg til radiomekanikara, hava vit eitt lærupláss tøkt frá 1/3-2006

Arbeiðið umfatar umvæling og tænastu innan elektronisk tól, so sum sjónvarp, radio og mangt annað. Eisini er ein partur av arbeiðinum beinleiðis samskifti og avgreiðsla av kundum.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Lærutíðin er 4 ár, men um umsøkjari hevur SIT prógv er møguligt at søkja um at fáa stytt læru og skúlatíð, skúlagongdin er á tekniskum skúla í Danmark.

Fyrimunir er um umsøkjari hevur SIT prógv

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og viðmælum innan 15. februar 2006

DELTA
ELEKTRONIKTÆNASTAN
Boks 67 · Gongin 1 · 110 Tórshavn
Tel 31 80 50

# Útróðrarbátur til sølu

Um hóskandi boð fæst verður útróðrarbáturin M/B »Osla«, Norðdepli, hervið lýstur til sølu við øllum rættindum og loyvum, 106 fiskidagar.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 221489 ella 220086**

## Vælkomin til missiónsviku í Gøtu í døgunum 7-12. februar 2006

**Møtini verða í kirkjukjallaranum.**

*Skrá fyri møtunum*

**Týskvøldið 7. februar**
kl. 20.00 Martin Restorf Jacobsen talar
Bethaniakóri syngur

**Mikukvøldið 8. februar**
kl. 20.00 Regin Høgnesen talar
Essa Jacobsen syngur

**Hóskvøldið 9. februar**
kl. 20.00 Jóhan Hendriksen talar
Streingjakóri í KFUM og K úr Klaksvík syngur
Innsavnan til Heimamissiónina

**Fríggjakvøldið 10. februar**
*kl. 20.00 Margeir Toftegaard talar*
*Thaborkóri syngur*

**Leygarkvøldið 11. februar**
*kl. 20.00 Tey ungu skipað fyri*
*Pól Johannesen talar*
*Ungdómskóri á Glyvrum syngur*
*Innsavnan til nýtt missónshús*

**Sunnudagin 12. februar**
Kl. 12.00 Gudstænasta v/ altargongd
Martin Restorf Jacobsen.
Kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Kl. 18.00 Niels Jacob Nielsen, talar
Bethaniakóri syngur.

***Skipað verður fyri barnaansing fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið***

# LÆRLINGAR TIL DAMOR

**Virksemi okkara er í vøkstri og tí sóknast vit eftir tveimum lærlingum - einum til handilin og einum til goymsluna**

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og lættur av lyndi, ikki bangin fyri at taka eina hond í har á stendur og kann arbeiða sjálvstøðugt.

Sum lærlingur hjá Damor fært tú beinanvegin tillutað títt ábyrgdarøki.

Vit bjóða tær eitt starv í einum spennandi og mennandi umhvørvi, har góður samstarvsandi valdar millum starvsfólkini.

Útbúgvingin fer fram í handli okkara á Hjalla og við skúlagongd í Danmark.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 15. februar 2006

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur til psyk. D2

Á D2 er eitt avloysarastarv fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi leyst at søkja til setan 15. mars til og við 31. desember 2006, á starvsbrøki 0,7.

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum. Vit raðfesta samarbeiði og trivnað høgt og at starvsfólkið er í støðugari menning og arbeitt áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið á deildini.

Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbólkar, bæði innan- og uttanhýsis.

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2, tlf. 304500, lokal 4002 ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, ella e-post bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 22. februar 2006 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og Starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn,** merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna "starvsfólk"*

## HÚS TIL SØLU



Matr. Nr. 57i í Froðba, við ástandandi sethúsum, til sølu. Húsini eru frá 1980 og eru 86m2, grundøkið er 990m2.

Áhugaði kunnu ringja 372930 / 266630

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo